RUNAVÍKAR KOMMUNA

søkir eftir

## Pedagogum til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
pedagogum 30t til 35t um vikuna, til vøggustovu, barnagarðstovu og serstovuna

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Størvini verða sett 16. august 2010 ella eftir nærri avtalu. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. juni 2010, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139
FO-610 Saltangará

Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.


# TIL SØLU
## Tvíhús og íbúðir

**Tvíhús í Sundalagnum. Eru klár at flyta inn í.**

**Íbúð í Havn tætt við skúla, barnagarð og handlar. Gott busssamband.**

**Íbúð í Sundalagnum. Klár at flyta inn í.**

**Er hetta nakað fyri teg, so ring tel. 56 20 80**




## Lærlingur

**Sølkt verður eftir HVS lærlingi til**

**P/F Mariu Poulsen**

Vit vænta at tú ert raskur og fyrikomandi.
Koyrikort er eitt krav.

Er tú tann rætti persónurin,
er tú vælkomin at tosa við okkum
og/ella senda eina umsókn til

**P/F Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8 · Postboks 182 · FO 110 Tórshavn

Meiri fæst at vita við at ringja til
Arthur Poulsen á tlf. 312 000
Ella send ein mail á ap@mp.fo

**P/F Maria Poulsen** er største HVS virkið í Føroyum við handli, verkstaði og búnýti. Í dag starvast um 35 fólk í fyritøkuni. Alt innan heilsølu og smásølu.

**Maria Poulsen**

HANSEN § THOMASSEN ADVOKATFIRMA

# PROKLAMA

Føroya Handverkarafelag hevur á aðalfundi tann 27. mars 2010 samtykt at leysgeva peningin, ið stendur bókaður sum pensjónsgrunnur í ársfrásøgn felagsins fyri 2009, at nýta í sambandi við rakstur felagsins.

Peningurin stavar í høvuðsheitum frá inngjaldingum frá ymiskum arbeiðsgevarum í eitt longri tíðarskeið fyri mongum árum síðani og er í hvussu se lutvíst ætlaður sum pensjón fyri limir felagsins.

Inngjaldingarnar eru í høvðusheitum hildnar uppat fyri fleiri árum síðan, og peningurin er ikki oyramerktur til ávísar limir felagsins.

Ein og hvør, ið metir seg hava eitthvørt krav í sambandi við hendan pening verður hervið innan tríggjar mánaðar frá í dag biðin um at fráboða møgulig krøv við neyðugum skjalprógvum til undirritaða.

Tá freistin er farin og møgulig skjalprógvaði krøv eru goldin, verður peningurin leysgivin Føroya Handverkarafelag.

*Tórshavn, tann 7. juni 2010*
**Djóni Thomassen, advokatur**

**Hansen & Thomassen Advokatfirma**

Bryggjubakki 22 · Postsmoga 106 · 110 Tórshavn
tel: (+) 298 359595 · fax: (+) 298 359596
advokat@advokat.fo · www.advokat.fo

**Annfinn V. Hansen, adv. (H)**
annfinn@advokat.fo

**Djóni Thomassen, adv. LL.M.**
djoni@advokat.fo

**Rannvá Ragnarsdóttir, adv. mediator**
rannva@advokat.fo

**Jens Andrias Vinther, adv.**
jav@advokat.fo

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# PEDAGOGAR OG HJÁLPARFÓLK
## TIL DAGSTOVNIN Í FUGLAFIRÐI

**Søkt verður eftir pedagogum og hjálparfólkum at byrja 1. august 2010 ella skjótast tilber.**

Tvey pedagogstørv á 40 t. viku í barnagarðsstovum

Eitt pedagogstarv 30 t. viku í barnagarðsstovu.

Eitt tíðaravmarkað pedagogstarv 30 t.viku í vøggustovu

í tíðarskeiðnum 1. aug 2010 til 31. januar 2011.

Eitt tíðaravmarka pedagogstarv á 35 t. viku í vøggustovu

í tíðarskeiðnum 1. aug. 2010 til 28. februar 2011.

Eitt tíðaravmarka hjálparfólkastarv á 30 t. viku í vøggustovu

Í tíðarskeiðnum 1. aug.2010 til 30.apríl 2011.

Dagstovnurin er skipaður í tvey hús við eini barnagarðstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Frá 01.08.2006 er dagstovnurin ætlaður 76 børnum við tað at stovnurin varð víðkaður við eini barnagarðsstovu.

**Vit sóknast eftir pedagogum:**
- í kunna arbeiða sjálvstøðugt, og eru førir fyri at orða seg skrivliga
- hevur arbeiðsroyndir, sum kunnu nýtast í dagliga arbeiðinum
- hevur umsorgan fyri børnunum
- er eldhugaður og jaligur
- hevur góð samstarvsevnir
- sær møguleikar fram um mørk

**Vit kunnu bjóða tær:**
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur
- eitt starv, har tú kanst brúka tínar dygdir,
- hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan
- samstarv við NSR tænastu, náms- og sálarfrøðilig ráðgeving,sosialu deild og stovnar hjá Fuglafjørðar kommunu

**Setanartreytir**
Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran í dagstovninum Julianna Næs, á tlf 737780.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða Býráðsskrivstovuni, Ennivegur 38, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi 18.juni 2010 kl. 10.00

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 25 og 26

Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknir ella onga at taka.

**Fuglafjarðar kommuna**


Sosialurin
www.sosialurin.fo